**Hanna D. Andreassen**

**Fra:** Svanna Hentze <svannahentze@gmail.com>
**Sendt:** mánadagur, 5. januar 2026 19:19
**Til:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið
**Emne:** Hoyringssvar til uppskot um dagførda dagstovnalóg, vegna Felags Foreldraráðið í Tórshavnar Kommunu

Góðan dagin,

Her er okkara hoyringssvar til uppskotið um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

**Viðmerkingar til uppskotið um dagførda dagsstovnalóg, vegna Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu.**

Vit hava á fundi umrøtt uppskotið til dagførdu dagstovnalógina, og her eru okkara viðmerkingar:

1. Orðið "*kann*" verður brúkt ógvuliga oftani.
Hetta kann skapa ótryggleika hjá foreldrunum.
Hvørji rættindi hava vit so rætt til, um kommunan "kann" bjóða, heldur enn ***skal*** bjóða.

2. Broyting 2&3
Hvussu verður tann fakliga breiddin sum var í ráðnum, varðveitt í samstarvsnevndini sum verður nevnd í 3c. Nú tað "bert" er landstýrismaðurin og kommunan, sum peika á hvussu hendan nevndin skal mannast. Har fakligheitin ikki beinleiðis peikar á sína umboða, og foreldur verður ikki umboða.

3. Broytingin 4
§3
Aldursbýtið av hvussu ein stovnur verður býttur upp, byggir á ein pedagogiskan arbeiðis hátt / teori, har børnini verða skild at eftir hvussu gomul tey eru, við tað at aldursbýtið verður skriva inn í lógartekstin. Er tað, sum tað verður sagt í kommentarinum, bert hesin háttur ið arbeiðast kann eftir í Føroyum. Og bert í serligum førum, kann kommunan geva undantaksloyvið frá hesum.
Um hetta aldursbýtið skal standa í lógartekstinum, eigur §3 stk. 4 verða eitt meir opið, har kommunurnar, hava betri møguleika at geva loyvið, at arbeiða verður eftir einum øðrvísi pedagogiskum háttin / teori, har børnini ikki vera deild eftir aldurbýtinum, sum kemur at standa í lógini.

4. §3a. stk 2

Stovnar skulu bert kunna verða stongdir í 3 samanhangandi viku, og ikki í 4 vikur, sum uppskotið leggur upp til.

5. Hvussu verður tryggja av kommununum at námsfrøðiliga ráðgevingin er nóg góð?
Hetta virkar ikki serliga greitt í lógini.

Vinaliga heilsan,

Vegna felags foreldraráðið í Tórshavnar kommunu.

Elin Brimnes, ráðslimur
Rannvá Bergleifsdóttir Sólsker, ráðslimur
Filip Jónson Eliasen, næstformaður
Svanna í Gong, forkvinna